

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum tá hann hevði framløgu í Oslo í dag. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Ben Arabo: Tvær sera áhugaverdar leiðir hjá okkum

**Jógvan Hugo Gardar**

29.08.2014 - 20:54

Oljan.fo

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum sigur at framleiðslan í fyrru hálvu av 2014 var innanfyri tað, sum varð mett á heysti 2013.

- Okkara útbygging av Orlando gongur framá, og er málið at byrja framleiðsluna í 2016. Leiðin varð góðkend til útbygging í 2013. Í løtuni eru samráðingar við felagið, ið rekur Ninian Central pallin, at tryggja handilsligar treytir fyri broytingum á pallinum. Framleiðslan byrjar væntandi í 2016, sigur Arabo.

Eitt annað áhugavert øki hjá Atlantic Petroleum er Perth. Faroe Petroleum, ið er fyristøðufelag á Lowlander og Perth samstarvsbólkurin kanna í løtuni møguleikan fyri eini felags útbygging av Perth/Dolphin/Lowlander.

- Kanningararbeiðið er væntandi liðugt við ársenda 2014. Partarnir eru samdir um karmarnar um samarbeiðið, og hava undirskrivað avtalu um hetta. Millum annað eru partarnir samdir um hvussu farast skal fram, og hvussu verkætlanin skal fíggjast, sigur Ben Arabo.

- Samarbeiðið millum eigararnar av Perth & Lowlander er eitt stórt stig fram ímóti eini útbygging av Perth. Vit síggja fram til at samarbeiða við Parkmead og Faroe Petroleum um at menna leiðina til útbygging og skapa virðir, sigur hann.

Metingar vísa at Perth leiðin inniheldur 5,1 mió. tunnur av oljulíka (contingent resources) netto til Atlantic Petroleum